

*Stjørnan hevði ikki stórvegis trupulleikar av grønu havnargentunum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Lítið veiggj í hesaferð

**HONDBÓLTUR** Kvinnurnar hjá Kyndli vóru stríðshugaðar í grannauppgerðini týskvøldið, men í gjár var lítið veiggj í. Stjørnan vann greitt og uppiborið

Uni Holm Johannesen

Grannauppgerðir eru nakað serligt. Tað eru dystir, har liðini oftast eru før fyri at spæla við fullari megi allatíðina.

Soleiðis var tað týskvøldið, tá Kyndil fekk javnleik móti Neistanum og har við legði fót fyri teimum bláu.

Í gjár var hinvegin lítið veiggj í Kyndli. Stjørnan vitjaði í høllini á Hálsi, og kvinnurnar úr Klaksvík vóru á sigurskós frá byrjan.

Gestirnir vóru á odda við fimm málum, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin, og tað bendi ongantíð á, at Kyndil fór at hótta.

Stjørnan vann uppiborið við seks málum, 25-19. Við sigrinum fara klaksvíkingar framvið Neistnaum á stigatalvuni. Stjørnan er nú nummar tvey.

*uni@sosialurin.fo*

# VB rann frá VÍF

**HONDBÓLTUR** VB setti ferðina upp miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og tá var lítið um VÍF

Uni Holm Johannesen

Alt rapaði hjá VÍF eina løtu í fyrra hálvleiki. Kvinnurnar úr Vestmanna fingu einki mál í 10 minuttir, tá vágskvinnur settu ferð á.

VB tóktist hava fult tamarhald á dystinum, og tað var bara í løtum, at VÍF royndi at hótta.

Tað var serliga Gurið Mortensen, sum skaraði framúr hjá VB. Hon var sannførandi í verjuspælinum, og hon gekk undan í álopsspælinum hjá gestunum. Hon var ein støðug hóttan.

## Bara tvey stig afturat

Munurin var tann sami í seinna hálvleiki. Fýra mál skilti liðini so at siga allatíð.



*Mynd: Álvur Haraldsen*

VÍF royndi at toga seg inn á aftur gestirnar eftir hvíldina, men leiðslan hjá VB var ongantíð í vanda. Vágskvinnur høvdu tamarhald á støðuni.

VB hevur nú vunnið tvær ferðir upp á slag. Vágskvinnur eru hinvegin anonymar á stigatalvuni, tí tær eru heili níggju stig frá finaluplássinum.

Tískil vann VB sær bara tvey stig afturat í skjáttuna hesaferð.

*uni@sosialurin.fo*

### Tjaldur – Neistin
29-28 (16-15)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 6-6**
**20 min.: 10-10**
**40 min.: 19-21**
**50 min.: 24-26**

**Tjaldur:** Adina Petrea 10, Simona Petersen 10, Jóhanna í Króki 3, Sarah Ann Thomsen 2, Heidi Sevdal 2, Annika Thomsen 2
**Neistin:** Jacklin Durhuus 7, Barbara Brauer 6, Birita Wardum 6, Lovisa Andreasen 4, Bára Hansen 3, Marjun Danberg 1, Elin Holm 1.
Útvísingar: Tjaldur 4, Neistin 2.

### Kyndil – Stjørnan
19-25 (5-13)

Dómarar: Thomas Juul Thomsen og Magnus í Króki

**10 min.: 0-4**
**20 min.: 3-10**
**40 min.: 9-16**
**50 min.: 13-21**

**Kyndil:** Anja Heinadóttir 6, Jórun Ludvig 4, Asleyg Súnadóttir 3, Turið Arge 3, Randi Wardum 2, Linda Weihe 1.
**Stjørnan:** Durita Ljósstein 6, Durita Christophersen 5, Anna Kristina Samson 4, Bára S. Klakstein 3, Una Olsen 3, Judit Hansen 2, Valentina Suciu 2.
Útvísingar: Kyndil 5, Stjørnan 6.

### VÍF – VB
22-26 (11-16)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 6-3**
**20 min.: 7-8**
**40 min.: 12-19**
**50 min.: 17-22**

**VÍF:** Agnas Olsen 7, Elisa Leo 3, Liljan Djurhuus 3, Torgunn Johansen 3, Rakul Joensen 2, Annika Poulsen 2, Linda Davidsen 1, Tóra Seloy.
**VB:** Gurið Mortensen 7, Bára K. Mortensen 4, Justina Balzarviciute 4, Rannvá Johannessen 3, Gintare Lydekaite 3, Svava Vestergaard 3, Laila Jespersen 1, Theresa Joensen 1.
Útvísingar: VÍF 3, VB 4.

# Neistin ræddist sigurskósina



*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** – Vit ræðast onkursvegna støðuna, vit eru í, og tað eru ov fáar, ið hava neyðuga dirvið at taka ábyrgd. Vit mangla rutinu í dag, sigur Birgir Hansen. Neistin lorkaði sigurin burtur í Runavík í gjár

Uni Holm Johannesen

Neistin kann bara takka sær sjálvum fyri, at liðið ikki er á odda við trimum stigum í Sunset-deildini júst nú.

Neistin var á odda 28-25, tá átta minuttir restaðu í av oddadystinum í Runavík. So kom stígur í. Tjaldur vann dystin 29-28.

– Vit ræðast onkursvegna støðuna, vit eru í, og tað eru ov fáar, ið hava neyðuga dirvið at taka ábyrgd. Vit mangla rutinu í dag, sigur Birgir Hansen, venjari hjá Neistanum.

Venjarin hjá bláu høvusstaðarkvinnunum tók timeout, men tað hjálpti lítið. Neistin spældi seg hinvegin til upplagdar málmøguleikar, men tók ikki av. Barbara Brauer, sum skeyt seks mál, slapp ongantíð í skotstøðu. Í seinasta álopinum í dystinum sendu kvinnurnar úr Havn í stólpan.

Tískil kundu Trygvi Mortensen og Tjaldur stórfegnast um sigurin. Kvinnurnar úr Runavík buldra víðari, og tær hava nú vunnið níggju landskappingardystir upp í slag.

## Bjartskygdur

Hóast Neistin misti eitt fet í gjár, eru Birgir Hansen og hansara leikarar framvegis væl við í stríðnum um finaluplássið.

Neistin manglar rutinu, men liðið lærir nógv av slíkum tøttum dystum.

– Tað ræður um at enda fremst ella næstfremst, og í so máta hava vit ikki mist stórvegis. Tað er ótrúliga keðiligt at missa alt á gólvið. Vit hava kós móti sigrinum, men tapa alt í seinastu løtu. Hinvegin ivist eg ikki í, at vit hava lært nógv av hesum dystinum, sigur Birgir Hansen.

Simona Petersen og Adina Petra vóru stórspælandi í álopinum hjá Tjaldur í gjár. Tær skutu 10 mál hvør.

## **Sunset Deildin** *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 15 | 430 | 344 | 86 | 25 |
| 2 | Stjørnan | 15 | 431 | 354 | 77 | 24 |
| 3 | Neistin | 16 | 437 | 367 | 70 | 24 |
| 4 | VB | 15 | 365 | 368 | -3 | 15 |
| 5 | Kyndil | 16 | 377 | 385 | -8 | 13 |
| 6 | VÍF | 16 | 364 | 447 | -83 | 6 |
| 7 | StÍF | 15 | 286 | 425 | -139 | 1 |